


www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 04 - 2013

# Frálandavinnan fótin fastan í høvuðsstaðnum

Føroyska frálandavinnan er í stórum vøkstri. Og hetta sæst eisini aftur í sjóvinnu-umhvørvinum í høvuðsstaðnum. Skansi Offshore, sum fyri trimum mánaðum síðani flutti inn í nýggjan og stásiligan skrivstovubygning nærhendis Skansanum í Havn, letur í dag upp dyrnar fyri almenninginum, sum kann síggja og fáa innlit í hesa fyri mong nýggju verðina. Ein kann siga, at umframt at vinnufyritøka letur upp dyrnar fyri almenninginum, so er hetta eisini stórur dagur fyri Havnina, sum leingi hevur roynt at lata upp dyrnar fyri vinnulívinum. Við nýggja frálandvirkseminum er høvuðsstaðurin eisini vorðin meira týðandi partur av olju- og frálandavirkseminum. Upprunaliga navnið Supply Service var herfyri skift til Skansi Offshore og flutti felagið sítt virksemi úr Lorvík til Havnar. Í dag frá kl. 16 til 18 verður so høvi hjá fólki at støkka inn á gólvið á Skansavegi 7, har tey umleið 11 starvsfólkini stýra virkseminum hjá teimum fýra veitingarskipunum hjá felagnum og teimum 100 monnunum, sum manna skipini. Hesi hava higartil arbeitt í Norðsjónum, men herfyri kom fyrsta skipið hjá felagnum, Eldborg á leiðirnar í Eysturafrika, har tað hevur fingið ein sáttmála við Statoil. Øll hini trý skipini eru leigað út til uppgávur í Norðsjónum.